# Vejle aftur sigrað á heimavølli

**Christian Høgni Jacobsen var í álopinum alla tíðina, og hann hevði ein góðan stútara, áðrenn undirmettu gestirnir úr Norðurjyllandi tóku øll stigini**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gongur ikki væl hjá einasta føroyska felagnum í næstbestu donsku deildini. Áskoðararnir í traditiónsríka Vejle hava eisini fingið ferilin av, at tað ikki longur skal roknast so nógv við áður so stolta fótbóltsfelagnum í býnum. Eftir sætta umfarið er Vejle á 11. plássinum. Vónirnar um skjóta uppflyting eru frystar, og í løtuni verður hugt meiri hin vegin, enn tað verður kagað uppeftir.

Sunnudagin hevði Vejle vitjan av FC Nordjylland, sum fór avstað við øllum stigunum. Frammanfyri bara 791 áskoðarum vunnu teir 2–1. Teir skoraðu í 13. og 52. minutti, og tá ið Vejle í 57. minutti fekk mál, vóru tað gestirnir, sum gjørdu sjálvmál. Christian Høgni Jacobsen var allar 90 minuttirnar í Vejle álopinum. Tíðliga í dystinum hevði hann ein góðan stútara ímóti mótstøðumálinum, men einki spurdist burturúr.

Grannarnir hjá Vejle, Horsens, sum fyri ikki so langari tíð síðani vórðu nevndir sum møguligur partur í felags liði við Vejle, eru á odda. Johan Byrial Hansen er í felagnum, sum sunnudagin vann 3–1 á heimavølli ímóti HFK Sønderjylland. Harvið hevur Horsens, sum hevur fyrrverandi verjuspælaran á landsliðnum, Kent Nielsen, við róðrið, átjan stig og fult stigatal eftir seks tey fyrstu umførini.

Næstfremst er Ølstykke, sum Henrik Larsen, føroyski landsliðsvenjarin, áður hevur vant, og sum Benny Johansen, ið fyri góðum ári síðani í nakrar dagar var rættuliga kendur í Føroyum, er venjari hjá. Ølstykke var hesa ferð á Amager, har teir vunnu 2–0 á Fremad, sum spruttaði eitt sindur í fyrstu umførunum, men sum nú tykist vera komið niður á jørðina. Fremad varð órógvað av, at teir mistu tveir spælarar. Longu í 33. minutti sá fyrri maðurin reytt.

Randers FC er væl við í toppinum, eftir at teir hesa ferð vunnu 2–1 á B1913. B93 vann 3–1 á Eysturbrúgv ímóti Fredericia, sum hevur ætlað sær at rokkið langt í ár. Í Nykøbing Falster tapti heimaliðið 3–2 ímóti Skjold úr Keypmannahavn. Leygardagin vann Silkeborg 3–0 á Tingbjerg stadion í Keypmannahavn ímóti Brønshøj, sum framvegis eigur fyrsta stigið til góðar. Harvið fingu niðurflytararnir eftir fleiri vónbrot sjálvsálitið upp á pláss aftur. Hitt niðurflytaraliðið, Køge, megnaði ikki meiri enn 1–1 á útivølli ímóti FC Aarhus.



*Christian Høgni Jacobsen*
*Savnsmynd*

# Jón Rói í Esbjerg

Tað er stórur munur á at vera í brennideplinum í superliguni og so at spæla í danmarksseriuni. Tær síðstu ferðirnar hevur Jón Rói Jacobsen ikki verið við í superliguni, og tí hevur hann verið á næstbesta Brøndby liðnum, sum spælir í danmarksseriuni.

Liðið er mannað við sera stórum fótbóltsevnum, sum allir vóna, at tað fer at verða pláss fyri teimum á besta liðnum. Venjari er Tom Køhlert, sum áður hevur verið venjari í superliguni, og sum tók um endan, tá ið Åge Hareide, sum nú venur Rosenborg, slepti endanum í fjør vár.

Sunnudagin vóru Jón Rói Jacobsen og liðfelagarnir í Esbjerg, har teir vunnu 2–0. Samlaði málmunurin hjá teimum er 25–5, og teir eru á sannførandi ovasta plássi. Men hetta er neyvan nøktandi fyri spælararnar, ið allir miðja eftir besta liðnum.

Leygardagin fer Jón Rói at spæla frammanfyri størri áskoðarafjøld og undir størri trýsti. Tá fer hann at stýra landsliðsverjuni í Skotlandi.

**jh**

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 13 | 6 | 7 | 14 |
| 2 FCK (M) | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 3 Brøndby (S) | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 9 | 3 | 6 | 13 |
| 4 OB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 10 |
| 5 FCM | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 9 | 1 | 10 |
| 6 Frem | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 6 | 7 | -1 | 9 |
| 7 AB | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 11 | -4 | 7 |
| 8 Viborg | 6 | 1 | - | 3 | - | 2 | 8 | 10 | -2 | 6 |
| 9 Herfølge | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 4 | 7 | -3 | 6 |
| 10 FC Nordsj. | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 9 | -2 | 5 |
| 11 AaB | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 12 AGF | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 4 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Danska 1. deild

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 6 | 6 | - | 0 | - | 0 | 15 | 2 | 13 | 18 |
| 2 Ølstykke | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 15 | 10 | 5 | 15 |
| 3 Køge | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 14 | 7 | 7 | 13 |
| 4 Randers FC | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 14 | 10 | 4 | 13 |
| 5 HFK Sønderj. | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 6 Silkeborg | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 14 | 5 | 9 | 12 |
| 7 Fremad Amager | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 9 | 2 | 10 |
| 8 Fredericia | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 8 | 2 | 10 |
| 9 FC Nordjylland | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 9 |
| 10 Skjold | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 9 | 10 | -1 | 7 |
| 11 Vejle | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 11 | -4 | 7 |
| 12 B 93 | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 6 |
| 13 B 1913 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 15 | -10 | 4 |
| 14 Nykøbing | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 8 | 13 | -5 | 3 |
| 15 FC Aarhus | 6 | 0 | - | 1 | - | 5 | 5 | 19 | -14 | 1 |
| 16 Brønshøj | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 3 | 16 | -13 | 0 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)

Skotska Premier League

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rangers | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 12 |
| 2 Celtic | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 12 | 2 | 10 | 10 |
| 3 Hearts | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 6 | 1 | 5 | 9 |
| 4 Dundee | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 4 | 2 | 7 |
| 5 Dunfermline | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 4 | 2 | 2 | 7 |
| 6 Hibernian | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 7 | -1 | 7 |
| 7 Motherwell | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 4 |
| 8 Livingston | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 9 Kilmarnock | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 10 Partick | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 5 | 7 | -2 | 2 |
| 11 Aberdeen | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 1 |
| 12 Dundee Utd. | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 2 | 13 | -11 | 0 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Partick)

Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KR | 15 | 9 | - | 3 | - | 3 | 25 | 17 | 8 | 30 |
| 2 Fylkir | 15 | 8 | - | 2 | - | 5 | 22 | 19 | 3 | 26 |
| 3 FH | 15 | 7 | - | 3 | - | 5 | 26 | 23 | 3 | 24 |
| 4 ÍA | 15 | 6 | - | 5 | - | 4 | 23 | 19 | 4 | 23 |
| 5 Þróttur | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 27 | 25 | 2 | 22 |
| 6 Grindavík | 15 | 7 | - | 1 | - | 7 | 21 | 25 | -4 | 22 |
| 7 ÍBV | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 22 | 24 | -2 | 20 |
| 8 KA | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 26 | 25 | 1 | 18 |
| 9 Valur | 16 | 5 | - | 2 | - | 9 | 20 | 27 | -7 | 17 |
| 10 Fram | 15 | 5 | - | 2 | - | 8 | 20 | 28 | -8 | 17 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)



Skála-GÍ 0-2 (0-0):

# GÍ slapp avstað

**Við útisigri á Skála tykist GÍ hava lyft sær endaligt út botnstríðnum, meðan tað hinvegin gerst alsamt daprari hjá Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fjør bjargaði Skála sær tilveruna í bestu fótbóltsdeildini við einum ótrúligum endaspurti, har liðið mest sum í einum leyp bukk um bæði TB og EB/-Streym.

Tað kann sjálvandi ikki útilokast, at hetta kann gerast aftur, men so skal liðið fáa ferð á. Her og nú.

Sunnudagin hevði Skála vitjan av GÍ, sum í ár bert tykist vera ein skuggi av sær sjálvum. Kanska ein av dystunum, har vónir vóru um stig, og í øllum førum ein slíkur, sum skuldi vinnast, um vónin skal varðveitast.



*Heldur ikki móti GÍ eydnaðist Skála at vinna sær stig, og nú sær av álvara svart út*
*Savnsmynd*

### Miðvøllurin avgjørdi

Men tað eydnaðist ikki hjá Skála, og sum so var dysturin ein ímynd av, hvussu spælið hjá Skála hevur verið í ár.

Fyri tað nógva var tað nevnliga so, at Skála var væl við í dystinum, og serliga fyrstu løtuna skaptu teir eisini málmøguleikar, men inn vildi bólturin ikki. Júst hetta hevur verið trupulleikin hjá liðnum, og tá mál ikki verða skotin, so er meira enn trupult at fáa nóg mikið av stigum.

Hjá GÍ hevur heldur ikki hildnast nakað serligt seinastu nógvu umførini. Størsti trupulleikin hevur verið fráveran, sum hevur rakt liðið. Ikki minst at leikandi venjarin, Krzystof Popczynski, hevur sitið uttanfyri.

Hetta hevur skert framrættaða spælið sera nógv, og tí hevur ábyrgdin fyri málskjótingini fyri tað mesta nú ligið á herðunum á miðvøllinum og verjuni. Og tað var miðvøllurin, sum avgjørdi dystin hesaferð. Tíðliga í seinna hálvleiki slapp Símun Samuelsen – sum annars hevði ein sera góðan dag – at draga nakað við bóltinum. Eingin skálamaður kom ímóti, og so langaði vágbingurin hjá GÍ til.

Hetta noyddi Skála fram aftur á vøllin, men tað bleiv ongan tíð soleiðis, at teir komu til somu møguleikar, sum teir høvdu fyri steðgin. Ístaðin kundi ein annar miðvallari hjá GÍ, Súni Olsen, avgera dystin, tá hann stutt fyri leiklok royndi seg við skoti.

### Nú stendur á

Og so skuldi verið leyst og liðugt við botnstríðnum hjá GÍ. Ein støða, sum er púra óvand fyri felagið, og ivaleyst eisini ein, sum teir als ikki vilja vera partur av. Møguliga verður tað so, at teir fyri fyrstu ferð ikki skulu út í Europa, men eina lítla vón hava teir tó enn.

Hjá Skála sær hinvegin svart út. Fýra dystir eru nú eftir at spæla, og so er spurningurin, hvørt teir á sama hátt kunnu toga seg upp á talvuna. Einki er at ivast í, at lykladysturin í so máta er tann í næst seinasta umfarinum, tá Skála vitjar í Vágum. Hinir dystirnir hjá liðnum eru móti KÍ (ú), VB (h) og EB/S (h).

### Dysturin í tølum

**Skála-GÍ 0-2 (0-0)**
0-1: Símun Samuelsen
0-2: Súni Olsen
**Dómari:** Oddmar Andreasen
**Skála:** Heini Kristiansen – Bárður Danielsen, Ronnie Hansen, Dusan Jaic, Iulian Florescu – Sveinur Justinussen, Aleksandar Jovevic, Hanus Thorleifsson – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen, Arnhold Berg
**GÍ:** Jacek Przybylski – Jónreid Dalheim, Bartal Eliasen, Kaj Ennigarð, Leivur Hansen – Áslakur Petersen, Súni Olsen, Høgni Madsen, Hanus Jacobsen – Símun Samuelsen, Bárður á Lakjuni.

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 14 | 9 | - | 4 | - | 1 | 33 | 14 | 19 | 31 |
| 2 B68 | 14 | 8 | - | 5 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 29 |
| 3 B36 | 14 | 9 | - | 1 | - | 4 | 28 | 15 | 13 | 28 |
| 4 NSÍ | 13 | 7 | - | 4 | - | 2 | 23 | 11 | 12 | 25 |
| 5 KÍ | 14 | 6 | - | 2 | - | 6 | 17 | 22 | -5 | 20 |
| 6 EB/Streymur | 13 | 5 | - | 4 | - | 4 | 24 | 25 | -1 | 19 |
| 7 GÍ | 14 | 4 | - | 4 | - | 6 | 16 | 22 | -6 | 16 |
| 8 VB | 14 | 3 | - | 4 | - | 7 | 15 | 24 | -9 | 13 |
| 9 FS V | 14 | 2 | - | 2 | - | 10 | 18 | 34 | -16 | 8 |
| 10 Skála | 14 | 1 | - | 0 | - | 13 | 8 | 27 | -19 | 3 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 13 | 9 | - | 3 | - | 1 | 24 | 9 | 15 | 30 |
| 2 TB | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 42 | 17 | 25 | 26 |
| 3 Sumba | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 24 | 12 | 12 | 22 |
| 4 VB | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 27 | 16 | 11 | 20 |
| 5 AB | 13 | 5 | - | 5 | - | 3 | 25 | 17 | 8 | 20 |
| 6 KÍ | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 28 | 36 | -8 | 19 |
| 7 B36 | 13 | 5 | - | 3 | - | 5 | 22 | 18 | 4 | 18 |
| 8 B71 | 13 | 3 | - | 2 | - | 8 | 17 | 20 | -3 | 11 |
| 9 LÍF | 13 | 3 | - | 1 | - | 9 | 14 | 36 | -22 | 10 |
| 10 B68 | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 7 | 49 | -42 | 7 |

## Máltindarnir

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| John Petersen | B36 | 9 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 7 |
| Andrew av Fløtum | HB | 7 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Birgir Jørgensen | VB | 6 |
| Milan Kulic | VB | 6 |
| Jákup á Borg | B36 | 5 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Karsten From | HB | 5 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 5 |
| John Heri Dam | B68 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 4 |
| Ronnie Samuelsen | EB/S | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Clayton Soares | FSV | 4 |
| Kim Poulsen | FSV | 4 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 4 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Kaj Roest | TB | 10 |
| Dan Mortensen | TB | 9 |
| Áki Mørk | B36 | 8 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 8 |
| Símun Hansen | AB | 7 |
| Allan Michelsen | TB | 7 |
| Eyðun Samuelsen | AB | 6 |
| Sigmundur Mikkelsen | VB | 6 |
| Pætur Dam Jacobsen | AB | 5 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 5 |
| Erling Fles | KÍ | 5 |
| Olgar Danielsen | KÍ | 5 |
| Óli Johannesen | TB | 5 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 5 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 4 |
| Ken Bærendsen | ÍF | 4 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 4 |